




ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo



*Gravsteinurin hjá konu Quilling sum æt Eleonora. Hetta er elsti gravsteinur vit vita um í gamla kirkjugarði. Hann er ein av teimum fáu gravsteinunum, sum liggur yvir sjálva grøvina.*

# Quilling verður so ikki gloymdur

**Øll hava hoyrt um Quillingsgarð, men tey eru kanska ikki so mong sum vita um Quilling. Kona hansara er ein av teimum, sum er grivin á gamla kirkjugarði í Havn. Keldan til hesa frásøgn er Johan Restorff Jacobsen**

QUILLINGSGARÐUR merkir havin hjá Quilling, og var hann gjørdur í seinnu helvt av 1700-talinum. Nú sæst ikki nógv til henda urtagarð longur, men eitt træ stendur eftir aftanfyri húsini í Quillingsgarði, sum vit nú rópa.

Norðurírski løgfrøðingurin George Young, sum hevur verið í Føroyum nakrar ferðir í samband við kanningararbeiði, hevur kannað, hvat samband hevur verið millum Isle of Man og Føroyar. Burtur úr hesum kanningum er millum annað komið, at maðurin sum Quillingsgarður ber navn eftir, var av oynni Man. Hesin maður var bøkjari hjá Vágsbotnshandlinum og æt John Quilling. Hann her frá 1768 til 1795.

Onki ættarfólk hjá honum er í Føroyum í dag, men í býnum Port St. Mary á oynni Man er hann komin fram á tvey fólk, sum hava hetta sama eftirnavn. Meðan Quilling var í Føroyum, doyði kona hansara Eleonora og er hon grivin í gamla kirkjugarðinum her í Havn, har ein stórur gravsteinur liggur á grøvini við eini langari innskrift á látíni. Á steininum stendur millum annað, at hon er fødd á oynni Man, at hon var gift við John Quilling, og at hon doyði í 1788. Tískil er hennara grøv ein tann elsta í kirkjugarðinum.

Ta tíðina Quilling, var í Føroyum, búði hann í einum húsum, sum vóru beint við urtagarðin. Tey hava ivaleyst staðið í Lagabrekkuni, sum førir niðan til Ríkisumboðsmannin.

Hesi hús eru ikki til í dag, men eftir teimum rannsóknum, sum eru gjørdar, tykist tað vera vist, at tey hava staðið í norðara endanum av teirri røðini, sum í dag verður rópt Quillingsgarður.

John Quilling átti ikki húsini sjálvur, men Rybergs handil í Fredriksvág, sum hann starvaðist hjá, átti tey. Húsini munnu verða bygd fyrst í 1780- unum. Tey eru við í teirri fyrstu húsaskrásetingini yvir Havnina.

Í húsinum var eisini bøkjaraverkstaður. Greitt er, at frú Løbner, sum vit umrøddu herfyri, búði á hesum staði í 1834, men tá hava húsini óivað verið sett í stand og eru uppstásað.

Quilling kom sum nevnt higar í 1768 saman við konu og børnum at ar-beiða hjá Rybergshandlinum, og hava tey átt eini átta børn. Eitt ella tvey teirra vóru fødd, áðrenn tey komu higar at búgva.

Í kirkjubókunum frá hesi tíð sæst ikki, at tey elstu eru fødd her. Men tey eru konfimeraði her, og tað sæst eisini, at elsta dóttur Quilling Catrine Christine Marie í 1794 giftist við dananum Hendrik Jensen Groot, sum Quillig hevði arbeitt saman við, aftaná at Ryberg slepti handilinum í 1788.

Tey fingu eitt barn í 1795 um heysti, og tað verður roknað við, at øll familjan er farin úr Føroyum í 1795.

Tá fóru tey til Danmarkar, har John Quilling doyði í 1820 og varð grivin í Holmens Kirkegård.

Tann dóttir hansara, sum giftist við Hendrik Jensen Groot i 1794, doyði umleið 1820. Ein yngri systir, Annika Hedvig, giftist tá við honum, og doyði hon í 1830. Ein triða systir giftist á Hebridunum.

## FIRMA C.S.BLANCKS ENKE OG CO.

Teir flestu, sum hava skrivað um hesa tíðina, halda, at tá Ryberg gav hand-ilin frá sær, ja so var alt liðugt. Men tað er ikki heilt rætt, tí dagbøkurnar ”The Stanley Expedition” frá 1789 nevna bæði handilin og alt tað, sum fyrifórst í Havnini tá.

Tá rigga Ryberg og teir av. Rosenmeyer og Floor eru har enn báðir. Í 1788 keypti eitt annað handilsfelag handilin frá Ryberg. Tað var C.S.Blancks Enke & Co. Í tí sambandi kemur ein nýggjur maður til Føroyar, sum æt Hendrik Jensen Groot. Tað var hann, sum giftist við dóttir John Quilling, og fara tey niður aftur í 1795 saman við Quilling, sum greitt frá. Tá so kona Groth doyr, giftist Groth uppaftur við konusysturini. Maðurin, sum kom at standa fyri handilsfelagnum og sostatt eisini handlinum, æt Erich Erichen, og giftist hann við einkjuni eftir Blanck og kom soleiðis upp í felagið. Ein beiggi hansara, Peter Erichen, hevur verið í Føroyum í Rybergs tíð við handilin. Hann hevur ivaleyst fingið beiggjan at keypa Vágsbotnshandilin frá Ryberg. Erichsen kom eisini at standa sum ánari av húsunum úti í Vágsbotni og somuleiðis av Quillingsgarði. C.S. Blancks enke & Co. hevði annars 13 skip, sum gingu upp á Føroyar, Vestindiu og onnur lond.

Peter Erichsen hevur verið í Føroyum eftir at Grooth og Quilling eru farnir aftur til Danmarkar. Í 1799 verður tað hildið, at Havnar klubbi varð stovnaður.

Ein sum kallaðist Claus Lund yrkti nakrar vísur, nakrar av teimum eru dagfestar. Við onkrari av teimum er viðmerkt, at tær vóru til eina veitslu í ”Thorshavns Club” í ”Erichsens Hus”. Tað hevur antin verið í Quillingsgarði ella í Vágsbotni, har eisini stóðu eini sethús, sum Erichsen átti, smbr. húsaskrásetingina frá 1819. Tað var tilskilað, at hesi húsini vóru í sera ringum standi.

**Komandi partur**

Í komandi parti verður umrøða av teimum trimum Effersøe systrunum Josephinu, Vilhelminu og Henriettu, sum liggja saman í gamla kirkjugarði. Vilhelmina hevði handil fyri konufólkaklæði í Mettustovu.



*Eldri mynd av Quillingsgarði, aftanfyri síggjast Amtmannshúsini*



*Quillingsgarður í okkara tíð*



*Quillingsgarður*